# P/F Tryggingarfelagið Lív

Skrás.nr. 5367

## Ársfrásøgn fyri 2010

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðslufrágreiðing | 3-6 |
| Leiðsluátekning | 7 |
| Átekning frá óheftum grannskoðarum | 8 |
| Nýttur roknskaparháttur | 9-12 |
| Rakstrarroknskapur | 13 |
| Fíggjarstøða | 14-15 |
| Frágreiðing um eginogn | 16 |
| Notur | 17-24 |
| Seinastu 5 árini | 25 |

# Upplýsingar um felagið

**FELAGIÐ**

P/F Tryggingarfelagið Lív
Kopargøta 1,
Postsmoga 206
FO-100 Tórshavn
Skrásetingarnr. 5367
Heimstaður: Tórshavn kommuna
2. roknskaparár

**NEVND**

Poul Hansen, nevndarformaður
Súsanna Ewaldsdóttir Sørensen, næstformaður
Una Jónsdóttir Joensen
Jógvan Mørkøre
Gunnleivur Dalsgarð

**STJÓRN**

Tummas Eliasen, stjóri

**AKTUARUR**

Poul Christoffur Thomassen, cand. act., góðkendur aktuarur

**TRYGGINGARLÆKNI**

Høgni Debes Joensen, landslækni

**GRANNSKOÐAN**

NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F
P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*, løggilt grannskoðaravirki

## HØVUÐSVIRKSEMI

Tryggingarfelagið Lív er eitt lívstryggingarfelag, sum selur lívstryggingar og eftirlønarskipanir á føroyska marknaðinum. Felagið umsitur tær tryggingar hjá LÍV-samtakinum, sum eru teknaðar síðan 1/1-2000.

Árið 2010 hevur verið nøktandi. Ársúrslitið var 35,9 mió. kr. áðrenn skatt og 29,4 mió. kr. eftir skatt. Felagið hevði eitt avlop, áðrenn flyting til kollektivt bonus og til kundaogn, uppá 41 mió. kr. Úrslitið er býtt soleiðis, at 35,8 mió. kr. eru fluttar til eginogn, 1,7 mió. kr. eru fluttar til kollektivt bonus, og 3,7 mió. kr. eru fluttar til kundaogn. Kundaognin er rentað við 8,7% í árinum. Tryggingartakararnir hava fingið tilskrivað eina konturentu uppá 3,5%.

## ÁRIÐ 2010 – GONGDIN Í VIRKSEMI OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM

### Tryggingarvirksemi

Tryggingargjøldini vóru í árinum góðar 244,8 mió. kr. Hetta er ein vøkstur uppá 10,7 mió. kr., svarandi til 4%. Við ársenda vóru 13.443 persónar fevndir av eftirlønar- og lívstryggingum móti 13.228 við ársbyrjan. Harumframt vóru 15.042 persónar fevndir av samlagstryggingum hjá Tryggingarfelagnum Lív móti 14.561 við ársbyrjan.

Tryggingarveitingarnar kunnu býtast millum útgjaldingar í sambandi við eftirlønaraldur, útgjøld í sambandi við deyða og óarbeiðsføri, umframt afturkeyp av tryggingum. Váðin við deyða og óarbeiðsføri verður endurtryggjaður. Skaðagongdin hevur verið góð tey seinastu árini, og tí verður givin avsláttur av tryggingargjaldinum upp á 25% við óarbeiðsføri og 30% við deyða. Tryggingarveitingarnar í árinum vóru 96,2 mió. kr. í mun til 61,4 mió. kr. árið frammanundan. Størsta broytingin er orsakað av afturkeypum í árinum.

Lívstryggingaravsetingarnar verða gjørdar upp til marknaðarvirðið við støði í einari rentukurvu. Broytingin í lívstryggingaravsetingum øktist í árinum frá 129,5 mió. kr. til 138,2 mió. kr. Høvuðsorsøkin til broytingina er rentugongdin í árinum.

Í 2010 hevur nógv orka verið nýtt til KT-skipanir fyri at menna nýggjar og betri tænastur. Kundarnir hava nú møguleika at fara inn á kundaportalin hjá LÍV, soleiðis, at tað er lætt at fáa eitt yvirlit yvir sína eftirløn. Í framtíðini fara kundarnir eisini at hava møguleika fyri at velja eina marknaðareftirløn, har íløgan fylgir marknaðinum. Henda menning er størsta orsøkin til, at rakstrarútreiðslurnar í sambandi við tryggingar-virksemið eru øktar í árinum frá 16,9 mió. kr. til 21,6 mió. kr.

### Fíggjarvirksemi

Íløguavkastið áðrenn rentuavdekning í 2010 var 6,9 %. Felagið tryggjar rentuváðan. Í árinum hevði hetta eina negativa ávirkan á íløguavkastið við 2%. Harumframt var avkastið merkt av íløgunum í EIK Banka, sum høvdu eina negativa ávirkan á uml. 1%. Samlaða íløguavkastið eftir fyrisitingarkostnað var 4,8%.

Meginparturin av íløgum felagsins verða gjørdar í lánsbrøv og partabrøv. 59% av íløgunum við ársenda í 2010 vóru í lánsbrøvum, meðan 21% vóru í partabrøvum umframt 16% í íløguprógvum, har størsti parturin av teimum undirliggjandi íløgunum eru lánsbrøv. Íløgupolitikkur felagsins er at spjaða íløgurnar, soleiðis at felagið ikki verður so hart rakt, um ein íløguflokkur ikki gevur nøktandi avkast.




Í 2010 var rentan fallandi, og hevði tað við sær kursvinning á lánsbrøvum, men móti endan av árinum byrjaði rentan tó at hække. Felagið hevði ein vinning av statslánsbrøvum á 8%, og vinningurin av realkreditlánsbrøvum var 5,5%. Hinvegin hevði felagið eitt tap av kredittlánsbrøvum, og var miðalavkastið av lánsbrøvunum tí 4,8%.

Partabrævakursirnir hildu eins og í 2009 áfram at hækka. Heimsvísitalið hækkaði við uml. 20%. Partabrævaíløgurnar hjá felagnum góvu í árinum tilsamans ein vinning á uml. 24 %. Vinningurin av teimum útlendsku partabrøvunum var 20%, meðan vinningurin av teimum føroysku børsskrásettu partabrøvunum var 34,5%. Munurin í vinninginum stavar frá íløguni í P/F Bakkafrost.

Avkastið av íløguognunum er lýst í talvuni niðanfyri.

| | Miðal íløga Primo/ultimo | Avkast t.DKK | Avkast % |
|---|---|---|---|
| Kapitalpartar í ass. fel. | 2.489 | -11 | -0,5% |
| Kapitalpartar | 199.397 | 47.587 | 23,9% |
| Lánsbrøv | 544.148 | 21.884 | 4,0% |
| Íløgufeløg | 116.428 | 6.386 | 5,5% |
| Útlán | 7.042 | 239 | 3,4% |
| Innlán | 117.401 | 1.432 | 1,2% |
| Úrslit áðrenn avdekning | 986.904 | 77.516 | 6,9% |
| Rentuavdekningur | 3.480 | -27.986 | -804,2% |
| | 990.384 | 49.530 | 5,0% |
| Fyrisitingarkostnaður | | -1.907 | -0,2% |
| Tilsamans | 990.384 | 47.623 | 4,8% |

**Kapitalstyrki**

Grundarfæfeingi felagsins øktist í árinum frá 74,1 mió. kr. til 121,4 mió. kr. Eginognin er økt frá 28,6 mió. kr. til 58,1 mió. kr. Stóra broytingin í eginognini stavar frá inntøkuføring av serligum avsetingum. Kollektivt bonus øktist við uml. 2 mió. kr. Fæfeingiskravið var ultimo 2010 48 mió. kr., og var kapitalstyrki felagsins sostatt 141,7 mió. kr. í 2010 í mun til 98,0 í 2009.

Kapitalstyrki felagsins er lýst í talvuni niðanfyri.

| t.DKK | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| Eginogn | 58.068 | 28.639 |
| Kundaogn | 63.330 | 45.497 |
| Grundarfæfeingi | 121.398 | 74.136 |
| Fæfeingiskrav | 48.094 | 42.863 |
| Grundarfæfeingi til avlops | 73.303 | 31.273 |
| Kollektivt bonuspotentiali | 68.418 | 66.697 |
| Kapitalstyrki | 141.721 | 97.970 |

**Úrslit og býti av hesum**

Úrslitið fyri 2010 kann útgreinast soleiðis:

| | t.DKK | % |
|---|---|---|
| Úrslit áðrenn býti | 41.386 | 100% |
| Býtt til: | | |
| Kollektivt bonuspotentiali | 1.721 | 4% |
| Kundaogn | 3.776 | 9% |
| Eginogn | 35.888 | 87% |
| | 41.386 | 100% |

Fyri skatt var úrslitið t.DKK 35.888. Eftir skatt var úrslitið t.DKK 29.429.

Býtið til eginognina kann útgreinast soleiðis:

| | t.DKK |
|---|---|
| Úrslit áðrenn skatt | 35.888 |
| Skattur | -6.460 |
| Úrslit eftir skatt | 29.429 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 3.639 |
| **At býta** | **33.068** |
| **Býtið:** | |
| Lagt í trygdargrunn | 13.178 |
| Lagt í grunn sambært viðtøkum | 6.877 |
| Flutt til næsta ár | 13.013 |
| | **33.068** |

Sum høvuðsreglu skulu eginogn og kundaogn hava sama part av úrslitinum. Í 2010 er tó tann broyting, at eginognin harumframt fær 31,5 mió. kr. vegna inntøkuføring av serligum avsetingum til samlagstryggingar.

Hetta hendir, tí felagið hevur broytt meginreglur og hevur valt at flyta tryggingarligar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum til eginognina.

**VÁÐASTÝRING**

Felagið er ávirkað av fleiri váðum. Hesir váðar eru í høvuðsheitum fíggjarligir, tryggingarligir, operationellir og handilsligir. Nevndin ger karmar fyri stýring av váðunum í samtakinum, meðan leiðslan hevur ábyrgdina av, at karmarnir verða hildnir.

**Fíggjarligir váðar**

Marknaðarváðin er váðin fyri, at virðið á aktivunum ella skyldunum hjá felagnum broytist vegna rentu- og kursbroyting v.m. Gjaldførisváðin er vandin fyri tapi, ið stendst av tørvinum fyri gjaldføri innan stutta tíðarfreist fyri at halda gjaldsskyldur felagsins.

Mótpartsváðin er váðin fyri tapi orsakað av, at mótpartar ikki halda sínar skyldur. Vantandi spjaðing kann hava tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri Tryggingarfelagið Lív er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv saman við avdekningi av rentuváða. Somuleiðis eru íløgurnar í partabrøv varisligar.

Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti. Felagið ger m.a. hvønn ársfjórðing stresstestir av váðanum, harundir tær sonevndu "trafikkljóstestirnar", har ognir og skyldur verða váðamettar.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at munandi partar av íløgunum eru í søluligum skrásettum virðisbrøvum. Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein stórur partur av íløguognunum er settur í stats- og realkredittlánsbrøv. Spjaðingarváðin avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur við sama útgevara.

**Tryggingarligir váðar**

Tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamnistíttleika, hættisligari sjúku v.m. Eitt nú økir hækkandi livialdur veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið á andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í samband við deyða og sjúku. Av hesum er mest týðandi váðin livialdur.

Spjaðingarváði í sambandi við tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi vegna ov stórar einstakar kundabólkar og einstakar tryggingar.

Felagið hevur avmarkað tryggingarligu váðarnar við at spjaða tryggingarmongdina millum nógvar ymiskar kundabólkar, fakfeløg o.fl. og við endurtrygging.

**Operationellir váðar**

Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligar ósemjur, ikki nøktandi ella skeivar mannagongdir ella svik. Felagið avmarkar operationellan váða við funktiónsskilnaði og innaneftirliti, sum støðugt verður endurskoðað og dagført.

**Handilsligir váðar**

Handilsligir váðar fevna um strategiskar váðar, váðar fyri umdømi og aðrar váðar við tilknýti til uttanhýsis ávirkanir. Felagið fylgir neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustig eru á kappingarførum stigi. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við viðskiftafólk.

**VITANARSTIG**

Felagið leggur stóran dent á, at starvsfólkini eru á høgum fakligum stigi, soleiðis at viðskiftafólk fáa holla ráðgeving. Starvsfólkini hava í stóran mun tryggingarliga ella fíggjarliga útbúgving. Starvsfólkini fáa støðugt hóskandi eftirútbúgving á sínum virkisøki.

**MENNING**

Felagið arbeiðir framhaldandi við at menna útboðið til viðskiftafólkini. Í næstum verður møguligt at tekna tryggingar til marknaðarrentu. Slík menning er nær knýtt at KT-skipanum, sum felagið støðugt mennir í samstarvi við uttanhýsis veitarar.

**ETISK FYRILIT**

Íløguvirksemið felagsins verður skipað soleiðis, at málið um hægst møguligt avkast verður rokkið, samstundis sum fyrilit verður havt fyri, at íløgurnar eru etiskt og sosialt ráðiligar.

Tann størsti parturin av íløgum felagsins verður umsitin av íløguróktarum uttan fyri felagið. Í avtalum við íløguróktararnar verður skrivað, at dentur áhaldandi skal leggjast á at halda grundleggjandi mannarættindi. Høvuðsmálið er, at ILO-sáttmálin verður hildin um ikki at misnýta barnaarbeiði, ikki at gera nýtslu av tvingsilsarbeiði, ikki at gera mismun millum kyn á arbeiðsplássum og at virða felagafrælsið.

Á heimasíðu felagsins (www.liv.fo) er listi til skjals, sum vísir, hvørjum feløgum Tryggingarfelagið Lív við seinasta árslok hevði íløgur í.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki annað hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**ÚTLIT FYRI 2011**

**Tryggingarvirksemi**

Roknað varð við, at gongdin í tryggingargjøldum fór at verða á leið tann sama sum árið frammanundan, og hetta hevur víst seg at halda.

Tryggingarmarknaðurin fyri 2011 verður væntandi merktur av, at nýggja pensjónsskipanin ætlandi verður sett í gildi 1. januar 2012. Hetta fer uttan iva at hava við sær nýggjar skipanir til pensjónsmarknaðin og møgulig nýggj strategisk samstørv fyri at standa seg í kappingini.

Tryggingarveitingarnar koma væntandi at vera á sama støði sum í 2010.

Umsitingarkostnaðir fyri 2011 verða væntandi á sama støði sum í 2010.

**Fíggjarvirksemi**

Fyri 2010 varð væntað, at partabrøvini fóru at geva eitt nakað minni avkast enn í 2009, men positiva gongdin helt áfram, og úrslitið í 2010 gjørdist betri enn í 2009. Tann stóri vøksturin í kursinum á partabrøvum fer neyvan at halda fram, men møguleikar eru fyri einum rímiligum avkasti av partabrøvum.

Rentan hevur verið fallandi meginpartin av 2010, men í síðsta parti av árinum byrjaði rentan at hækka. Nógv bendir á, at rentan á lánsbrøvum fer at hækka enn meira, og tí kann roknast við, at avkastið av lánsbrøvum í 2011 verður minni enn í 2010.

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri felagið fyri 2010. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 25. mars 2011

**Stjórn**

Tummas Eliasen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Poul Hansen<br>nevndarformaður | Súsanna Ewaldsdóttir Sørensen<br>næstformaður | Una J. Joensen |
| Jógvan Mørkøre | Gunnleivur Dalsgarð | |

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

**Til partaeigararnar í P/F Tryggingarfelagnum Lív**

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Tryggingarfelagnum Lív fyri roknskaparárið 01.01.2010 til 31.12.2010, við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu pr. 31.12.10 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 01.01.2010 til 31.12.2010 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, tann 25. mars 2011

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Hans Laksá
løggildur grannskoðari

Joen Magnus Lamhauge
skrásettur grannskoðari

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT,
Løggilt grannskoðaravirki

Heini Thomsen
løggildur grannskoðari

**ALMENT**

Ársfrásøgnin er gjørd sambært viðtøkum felagsins og í samsvar við ásetingarnar í tryggingarlógini og í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir frá Tryggingareftirlitinum. Við nýggju tryggingarlógini frá 2008 vórðu hugtøkini "innrokning" og "máting" tikin í nýtslu. "Innrokning" merkir at taka við í roknskapin og "máting", hvussu virðisásett verður.

**Alment um innrokning og máting í ársfrásøgn felagsins**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt, sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broytingar í avsetingum og broytingar í bonus – so hvørt hesar verða staðfestar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virði á ognini verður mett álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá hesar eru sannlíkar og kunnu mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður fyrilit tikið fyri væntaðum tapi og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Avrunding av upphæddum**

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Transaktiónir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**RAKSTRARÚRSLIT 2010**

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2010 eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í tí.

Felagið hevur sambært lóggávuni gjørt ítøkiligar reglur fyri býti av úrsliti, og tær eru fráboðaðar Tryggingareftirlitinum.

Úrslitið fyri 2010 er býtt eftir nevndu meginreglum, sum í høvuðsheitum virka á henda hátt fyri býti av úrslitinum:

- Eginognin og kundaognin hava fingið eitt avkast svarandi til miðal fíggjaravkastið aftaná avdekning umframt 3,5%. Harumframt hevur eginognin fingið tillutað avlopið av samlagstryggingum.
- Restin av avlopinum er flutt til kollektivt bonuspotentiali.

Sum høvuðsreglu skulu eginogn og kundaogn hava sama part av úrslitinum. Í 2010 er tó tann broyting, at eginognin harumframt fær 31,5 mió. kr. vegna inntøkuføring av serligum avsetingum til samlagstryggingar.

Hetta hendir, tí felagið hevur broytt meginreglur og hevur valt at flyta tryggingarligar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum til eginognina.

**RAKSTRARROKNSKAPUR**

**Tryggingargjøld**

Tryggingargjøld og innskot verða innroknað í fíggjarstøðuna á skrásettum gjaldkomudegi. Tíðaravmarking verður gjørd, soleiðis at innroknaðu tryggingargjøldini svara til roknskaparárið.

**Úrslit av íløguvirksemi**

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og útlánum og vinningsbýti av kapitalpørtum.

Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum og útlánum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**

Innroknað sum tryggingarveitingar verða goldnar veitingar, endurgoldið frá endurtryggingum, broyting í avsetingum til endurgjøld og broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld.

**Bonus**

Broyting í kollektivum bonuspotentiali er tann partur av tí staðfesta rakstrarúrslitinum eftir rentutilskriving v.m., sum verður tilskrivaður ella skuldskrivaður tryggingarmongdini sum óbýtt avseting. Um parturin av staðfestum úrsliti hjá tryggingarmongdini er negativur, fevnir posturin um nýtslu av kollektivum bonuspotentiali, sum er avsett undanfarin ár.

Broyting í kundaogn fevnir um nettoupphæddina, sum er løgd afturat kundaognini, umframt upphæddina, sum kundaognin er rentað við í árinum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**

Felagið hevur felags fyrisiting við móðurfelagið, og fyrisitingarkostnaðir verða býttir sambært skrivligari avtalu. Hesir kostnaðir fevna um kostnaðir í sambandi við útveganir og fyrisiting av tryggingarmongdini íroknað kostnaðir, ið hava samband við útgjøld av veitingum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Aðrar inntøkur**

Felagið hevur valt at afturføra tryggingarligar avsetingar til samlagstryggingar frá eldri árum vegna nýggjar roknskaparreglur. Afturførdar eru 31,5 mió. kr. sum "Aðrar inntøkur".

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum postum.

Møgulig broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, P/F Føroya Lívstrygging og systurfelagið P/F Royndina. Móðurfelagið rindar samanlagda skattin fyri samtakið. Skattaávirkanin av samskattingini verður býtt millum feløgini í samtakinum í mun til skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtir felagið hitt sonevnda lagurprinsippið, sum m.a. hevur við sær, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Immateriell ogn**

Ritbúnaður umframt onnur immateriell ogn verður innroknað í fíggjarstøðuna til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar og samanløgdu niðurskrivingarnar vegna væntað tap. Møguligt tap verður mett við støði í eini niðurskrivingartest.

**Íløguognir**

Fíggjarамboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlað fíggjarамboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Sáttmálavirðið á handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjarамboðum, verður tikið við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjarамboðini.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjarамboðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni.

**Áogn**

Dagsvirðið á áogn verður ásett við fyriliti fyri væntaðum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, fevna um goldnar útreiðslur sum viðvíkja næsta roknskaparári umframt tíðaravmarkaðar rentur av fíggjarамboðum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**

Lívstryggingaravsetingar verða mátaðar við at gera upp marknaðarvirðið á væntaðum framtíðar gjaldsstreymum fyri hvørja einstaka trygging. Marknaðarvirðið verður roknað út við at diskontera tær einstøku gjaldingarnar við eini rentu, sum er grundað á ein rentukurvu, sum danska Fíggjareftirlitið hevur almannakunngjørt. Teir mettu framtíðar gjaldsstreymarnir verða útroknaðir við støði í væntaðari livitíð og avlamnisintensiteti grundað á egnar metingar av felagsins tryggingarmongdum.

Lívstryggingaravsetingar innihalda eitt váðaískoyti, sum hevur fyrilit fyri, at tryggingartakarar væntandi liva alsamt longur. Harumframt verður fyrilit tikið fyri sannlíkindum fyri, at tryggingartakarar afturkeypa egnar tryggingar, grundað á greiningar av tryggingarmongdini. Fyri tryggingar, grundaðar á sáttmálar við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, eru hesi sannlíkindi mett til 10%. Fyri aðrar tryggingar eru afturkeypssannlíkindini mett til 100%.

Tryggjaðar veitingar eru marknaðarvirðið á teimum veitingum, sum eru tryggjaðar tí einstaka tryggingartakaranum við einum ískoyti til væntaðan framtíðar kostnað av umsiting og við frádrátti av teimum avtalaðu framtíðar tryggingargjøldunum. Tryggjaðar veitingar fevna um eina metta upphædd til rindan av framtíðar veitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum lýsir skyldur til at veita bonus viðvíkjandi avtalaðum tryggingargjøldum, sum ikki eru fallin til gjaldingar enn.

Bonuspotentiali á frítryggingum fevnir um virðið á skyldum til at veita bonus viðvíkjandi longu inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevna um ikki goldnar, men falnar tryggingarveitingar. Í upphæddini er innroknað ein meting av falnum tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Kollektivt bonuspotentiali er parturin hjá tryggingarmongdini av staðfestum úrslitum, sum eru avsett kollektivt til tryggingar við rætti til bonus, út yvir lívstryggingaravsetingar og avsetingar til endurgjøld.

Kundaogn er ein partur av grundarfæfeinginum á jøvnum føti við eginognina, men við tíðini gerst kundaognin vanligt bonus hjá teimum einstøku tryggingartakarunum, og sostatt er kundaognin fevnd av tryggingarligu avsetingunum.

**Skuld**

Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virði á aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og tí skattastigi, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaaktiv, harundir skattavirðið á framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Aktuellur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**LYKLATØL**

Tey eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir.

Lyklatølini í "avkastskemanum" (sí notu 20) eru roknað soleiðis, at eitt ársavkast er gjørt upp við støði í vigaðari miðalsaldo av íløgum fyri árið.

| Nota | | 2010<br>DKK | 2009<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Tryggingargjøld brutto | 244.836.803 | 234.125 |
| | Endurtryggingargjøld | -6.929.994 | -6.614 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans** | **237.906.809** | **227.511** |
| | Inntøkur frá assosieraðum virkjum | -11.427 | 0 |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 29.553.678 | 38.201 |
| 3 | Virðisjavningar | 19.987.620 | 28.749 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.907.274 | -2.462 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi tilsamans** | **47.622.597** | **64.488** |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -97.030.507 | -58.908 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingum | 2.065.250 | 2.733 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | -1.200.562 | -5.240 |
| | Broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld | 0 | 0 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning tilsamans** | **-96.165.819** | **-61.415** |
| 6 | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -138.182.472 | -129.516 |
| | Broyting í endurtryggjaranna parti | -69.941 | -9 |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning tilsamans** | **-138.252.413** | **-129.525** |
| | Bonus tilskrivað í árinum | -5.510.031 | 0 |
| 7 | Afturførdar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum | 31.487.898 | 0 |
| | Broyting í kollektivum bonuspotentiali | -1.721.415 | -66.696 |
| | Broyting í kundaogn | -17.832.794 | -13.080 |
| | **Bonus tilsamans** | **6.423.658** | **-79.776** |
| 4 | Útveganarkostnaðir | -1.111.282 | -916 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaðir | -22.474.635 | -17.218 |
| | Provisjónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum | 1.939.499 | 1.289 |
| | **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning tilsamans** | **-21.646.418** | **-16.845** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | 2.040.031 | 2.167 |
| | **TRYGGINGARTEKNISKT ÚRSLIT** | **37.928.444** | **6.605** |
| | Íløguúrslit av eginognini | -2.040.031 | -2.167 |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **35.888.413** | **4.438** |
| 8 | Skattur | -6.459.912 | -799 |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **29.428.501** | **3.639** |

| Nota | | 2010 DKK | 2009 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 9 | Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 4.978.548 | 0 |
| | **Íløgur í atknýtt og assosierað virkir tilsamans** | **4.978.548** | **0** |
| | Kapitalpartar | 222.015.838 | 176.778 |
| | Lánsbrøv | 631.460.230 | 456.835 |
| | Íløguprógv | 169.897.236 | 62.958 |
| | Onnur útlán | 14.083.670 | 0 |
| | Innlán | 15.268.205 | 219.533 |
| | Avdekningar móti fíggjarligum váðum | 16.960.017 | 0 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir tilsamans** | **1.069.685.195** | **916.104** |
| | **ÍLØGUOGN TILSAMANS** | **1.074.663.743** | **916.104** |
| | Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld | 179.884 | 250 |
| | **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur tils.** | **179.884** | **250** |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 11.820.452 | 8.377 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur tilsamans** | **11.820.452** | **8.377** |
| | Áogn hjá tryggingarfeløgum | 1.765.570 | 1.910 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | 13.597.194 | 18.988 |
| | **ÁOGN TILSAMANS** | **27.363.100** | **29.525** |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 7.490.102 | 7.253 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 17.510 | 0 |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **7.507.612** | **7.253** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.109.534.454** | **952.882** |

| Nota | | 2010 DKK | 2009 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| 10 | Partapeningur | 25.000.000 | 25.000 |
| 11 | Trygdargrunnur | 13.178.352 | 0 |
| 12 | Burturleggingar sambært viðtøkum | 6.876.760 | 0 |
| 13 | Framflutt úrslit | 13.012.769 | 3.639 |
| | **EGINOGN** | **58.067.881** | **28.639** |
| | Tryggjaðar veitingar | 414.697.320 | 257.878 |
| | Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum | 327.418.334 | 303.965 |
| 14 | Bonuspotentiali á frítryggingum | 120.521.554 | 162.612 |
| 15 | **Lívstryggingaravsetingar tilsamans** | **862.637.208** | **724.455** |
| | Avsett til endurgjøld | 6.440.830 | 5.240 |
| 16 | Kollektivt bonuspotentiali | 68.417.920 | 66.697 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 34.350.154 | 60.328 |
| 17 | Kundaogn | 63.329.639 | 45.497 |
| | **AVSETINGAR TIL TRYGGINGAR- OG ÍLØGUAVTALUR TILSAMANS** | **1.035.175.751** | **902.217** |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging | 15.614.041 | 12.906 |
| | Onnur skuld | 676.782 | 9.120 |
| 18 | **SKULD TILSAMANS** | **16.290.822** | **22.026** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.109.534.454** | **952.882** |
| 19 | Eventualskyldur | | |

| t.DKK | Parta-peningur | Trygdar-grunnur | Framflutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Kapitalinnskot 1. januar 2009 | 25.000 | - | - | 25.000 |
| Úrslit | - | - | 3.639 | 3.639 |
| **Eginogn 31. desember 2009** | **25.000** | **0** | **3.639** | **28.639** |
| | | | | |
| Eginogn 1. januar 2010 | 25.000 | 0 | 3.639 | 28.639 |
| Flutt til trygdargrunn | - | 18.000 | -18.000 | 0 |
| Úrslit | - | - | 29.429 | 29.429 |
| **Eginogn 30. juni 2010** | **25.000** | **18.000** | **15.068** | **58.068** |

**Solvenskrav og kjarnufæfeingi**

| | **2010** DKK | **2009** t.DKK |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingi og fæfeingiskrav** | | |
| Eginogn | 58.067.881 | 28.639 |
| Kundaogn | 63.329.639 | 45.497 |
| **Kjarnufæfeingi** | 121.397.520 | 74.136 |
| | | |
| - Immateriell ogn | 0 | 0 |
| - Útsett skattaogn | 0 | 0 |
| | | |
| **Grundarfæfeingi** | **121.397.520** | **74.136** |
| | | |
| Fæfeingiskrav | 48.094.494 | 42.863 |
| **Grundarfæfeingi til avlops** | **73.303.026** | **31.273** |

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Nota 1 • Tryggingargjøld brutto** | | |
| Kapitaltryggingar | 103.989.045 | 114.360 |
| Rentutryggingar | 43.299.243 | 52.501 |
| Ratutryggingar | 40.185.510 | 6.792 |
| **Leypandi tryggingargjøld tilsamans** | **187.473.797** | **173.653** |
| Samlagstryggingar | 56.939.985 | 60.187 |
| Innskot tilsamans | 423.021 | 285 |
| **Tryggingargjøld brutto tilsamans** | **244.836.803** | **234.125** |
| | | |
| Tryggingargjøldini kunnu útgreinast soleiðis: | | |
| Individuelt teknaðar tryggingar | 20.774.968 | 4.759 |
| Tryggingar teknaðar í.s.v. starvssetan | 167.121.850 | 169.179 |
| Samlagstryggingar | 56.939.985 | 60.187 |
| **Tilsamans** | **244.836.803** | **234.125** |
| | | |
| Tryggingar við bonusskipan | 244.836.803 | 234.125 |
| Tryggingar uttan bonusskipan | 0 | - |
| Unit link-sáttmálar | 0 | - |
| **Tilsamans** | **244.836.803** | **234.125** |
| | | |
| Tal av tryggjaðum er: | | |
| Individuelt teknaðar tryggingar | 1.486 | 463 |
| Tryggingar teknaðar í.s.v. starvssetan | 11.957 | 12.765 |
| Samlagstryggingar | 15.042 | 14.561 |
| | | |
| **Nota 2 • Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.** | | |
| Rentur av virðisbrøvum, útlánum og innlánum | 25.105.464 | 35.150 |
| Vinningsbýti | 4.446.278 | 3.046 |
| Annað | 1.937 | 5 |
| **Rentur og vinningsbýti v.m. tilsamans** | **29.553.678** | **38.201** |
| | | |
| **Nota 3 • Virðisjavningar** | | |
| Lánsbrøv | -1.552.629 | 8.169 |
| Kapitalpartar | 43.140.236 | 42.173 |
| Íløguprógv | 6.386.047 | 0 |
| Aðrir avdekningar | -29.153.216 | -21.593 |
| Valutaterminshandlar | 1.167.182 | 0 |
| **Virðisjavningar tilsamans** | **19.987.620** | **28.749** |

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |

**Nota 4 • Fyrisitingarkostnaðir og útveganarkostnaðir umfata:**

| | | |
|---|---|---|
| Samsýning til aðalfundarvalda grannskoðan: | | |
| Grannskoðan | -353.738 | -90.000 |
| Annað arbeiði enn grannskoðan | -267.212 | -20.623 |
| Tilsamans | -620.950 | -110.623 |

Allar lønir eru goldnar av móðurfelagnum, og felagið rindar móðurfelagnum umsitingargjald sambært avtalu hesum viðvíkjandi.

| | | |
|---|---|---|
| Løn og eftirløn til stjórn | 0 | 0 |
| Nevndarsamsýning | 0 | 0 |
| Miðaltal av starvsfólki | 0 | 0 |

**Nota 5 • Útgoldnar veitingar**

| | | |
|---|---|---|
| Eftirlønir | -167.269 | -120 |
| Eingangsútgjøld við deyða | -704.087 | -619 |
| Eingangsútgjøld við pensionering | -5.734.015 | -4.240 |
| Avlamisveitingar | -62.529 | -7 |
| Gjaldsundantøka o.a. | -562.817 | -413 |
| Samlagstryggingar | -52.105.722 | -44.415 |
| Afturkeyp | -35.828.103 | -9.089 |
| Kontant útgoldið bonus | -1.865.965 | -5 |
| **Útgoldnar veitingar tilsamans** | **-97.030.507** | **-58.908** |

**Nota 6 • Broyting í lívstryggingaravsetingum**

| | | |
|---|---|---|
| Tryggjaðar veitingar | 156.819.460 | -19.175 |
| Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum | 23.453.194 | 84.350 |
| Bonuspotentiali á frítryggingum | -42.090.182 | 62.858 |
| Avsett til bonus og avsláttur v.m. | 0 | 1.483 |
| **Broyting í lívstryggingaravsetingum** | **138.182.472** | **129.516** |

| | 2010 DKK | 2009 t.DKK |
|---|---|---|

**Nota 7 • Afturførdar avsetingar viðvíkjandi samlagstryggingum**

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| Afturførdar avsetingar vegna broyttar meginreglur | 31.487.898 | 0 |
| **Aðrar inntøkur tilsamans** | **31.487.898** | **0** |

**Nota 8 • Skattur**

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| Aktuellur skattur | -6.459.912 | -799 |
| Útsettur skattur | 0 | 0 |
| **Skattur tilsamans** | **-6.459.912** | **-799** |
| | | |
| Úrslit áðrenn skatt | 35.888.413 | 4.435 |
| Munur millum roknskaparligar og skattligar avskrivingar | 0 | 0 |
| Skattlig hall frá undanfarnum árum | 0 | 0 |
| Skattskyldug inntøka | 35.888.413 | 4.435 |
| | | |
| Partafelagsskattur, 18% (fluttur til samskatting við móðurfelagið) | -6.459.912 | -799 |
| Broyting í útsettum skatti | 0 | 0 |
| **Skattur tilsamans** | **-6.459.912** | **-799** |
| | | |
| Effektivt skattaprosent | 18,0% | 18,0% |

**Útsettur skattur kann lýsast soleiðis:**

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| Útsettur skattur við ársbyrjan | 0 | 0 |
| Broyting í árinum | 0 | 0 |
| **Útsettur skattur við ársenda** | **0** | **0** |

**Nota 9 • Kapitalpartar í assosieraðum virkjum**

| | Virksemi | Heimstaður | Ognarpartur | Úrslit 2010 | Eginogn 31-12-2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F Lutaíbúðarvirkið | Fastognarfelag | Tórshavn | 50% | -42.905 | 9.957.095 |

**Nota 10 • Partapeningur**

Partapeningur felagsins umfatar 1 partabræv á kr. 25.000.000.

Partapeningurin er ikki býttur upp í flokkar.

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Nota 11 • Trygdargrunnur** | | |
| Salda við ársbyrjan | 0 | 0 |
| Flutt av ársins úrsliti | 13.178.352 | 0 |
| **Trygdargrunnur við ársenda** | **13.178.352** | **0** |
| | | |
| **Nota 12 • Burturleggingar sambært viðtøkum** | | |
| Salda við ársbyrjan | 0 | 0 |
| Flutt av ársins úrsliti | 6.876.760 | 0 |
| **Trygdargrunnur við ársenda** | **6.876.760** | **0** |
| | | |
| **Nota 13 • Framflutt úrslit** | | |
| Salda við ársbyrjan | 3.639.380 | 0 |
| Ársins úrslit | 29.428.501 | 3.639 |
| Flutt til trygdargrunn | -13.178.352 | 0 |
| Flutt til grunn sambært viðtøkum | -6.876.760 | 0 |
| **Framflutt úrslit við ársenda** | **13.012.769** | **3.639** |
| | | |
| **Nota 14 • Bonuspotentiali á frítryggingum** | | |
| Uppgjørt bonuspotentiali á frítryggingum | 120.521.554 | 162.612 |
| Lænt av bonuspotentiali í árinum | 0 | 0 |
| Lænt av bonuspotentiali tilsamans | 0 | 0 |
| **Bonuspotentiali á frítryggingum við ársenda** | **120.521.554** | **162.612** |
| | | |
| **Nota 15 • Lívstryggingaravsetingar** | | |
| Lívstryggingaravsetingar við ársbyrjan | 724.454.736 | 596.422 |
| Akkumulerað virðisjavnan við ársbyrjan | -10.839.793 | -27.122 |
| Retrospektivar avsetingar við ársbyrjan | 713.614.943 | 569.300 |
| | | |
| Broyting í árinum vegna: | | |
| Tryggingargjøld brutto | 188.016.509 | 169.374 |
| Rentutilskriving | 18.271.583 | 14.839 |
| Tryggingarveitingar | -43.124.638 | -10.252 |
| Kostnaðir eftir tilskriving av umsitingarbonus | -18.321.214 | -21.747 |
| Váðaúrslit eftir tilskriving av váðisbonus | -12.067.847 | -7.899 |
| Retrospektivar avsetingar við ársenda | 846.389.336 | 713.615 |
| Akkumulerað virðisjavnan við ársenda | 16.247.872 | 10.840 |
| **Lívstryggingaravsetingar við ársenda** | **862.637.208** | **724.455** |

| | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |

**Nota 16 • Kollektivt bonuspotentiali**

| | | |
|---|---|---|
| Kollektivt bonuspotentiali við ársbyrjan | 66.696.505 | 0 |
| Flutt til/frá rakstrarroknskapi | 1.721.415 | 66.697 |
| **Kollektivt bonuspotentiali við ársenda** | **68.417.920** | **66.697** |

**Nota 17 • Kundaogn**

| | | |
|---|---|---|
| Kundaogn við ársbyrjan | 45.496.845 | 32.417 |
| Býtt til kundaogn | 18.021.925 | 9.724 |
| Útgoldið av kundaogn | -3.965.369 | -502 |
| Yvirskotspartur hjá kundaogn | 3.776.238 | 3.858 |
| **Kundaogn við ársenda** | **63.329.639** | **45.497** |

**Nota 18 • Skuld**

Øll skuld felagsins fellur til gjaldingar innan 1 ár.

**Nota 19 • Eventualskyldur**

| | | |
|---|---|---|
| Sum trygd fyri skyldum mótvegis tryggingartakarum eru ognir skrásettar við árslok fyri | 1.064.525.792 | 915.491 |

**Nota 20 • Úrslit av fíggjarognum í 2010**

| | Marknaðarvirði | | | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| | Við ársbyrjan | Við ársenda | Netto-íløga | í % áðrenn skatt |
| Grundøki og bygningar | 0 | 0 | 0 | |
| Ognarfeløg | 0 | 0 | 0 | |
| **Grundøki og bygningar tilsamans** | **0** | **0** | **0** | |
| Dótturfelag | 0 | 0 | 0 | |
| Børsskrásettir føroyskir kapitalpartar | 8.428.469 | 23.771.843 | 9.940.544 | 34,5% |
| Føroyskir kapitalpartar, sum ikki eru børsskrásettir | 0 | 4.978.548 | 5.000.000 | -0,5% |
| Børsskrásettir útlendskir kapitalpartar | 168.349.637 | 203.581.772 | -2.554.650 | 20,4% |
| Útlendskir kapitalpartar, sum ikki eru børsskrásettir | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Aðrir kapitalpartar tilsamans** | **176.778.106** | **232.332.163** | **12.385.893** | **21,3%** |
| Statslánsbørv (Øki A) | 47.174.016 | 242.141.795 | 188.810.869 | 8,0% |
| Realkredittlánsbrøv | 400.189.110 | 465.725.558 | 59.864.588 | 5,5% |
| Indekslánsbrøv | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Kreditlánsbrøv investment grade | 42.889.698 | 45.153.429 | 1.999.983 | 4,8% |
| Kreditlánsb. non inv. grade og emerging markets | 29.540.427 | 43.383.767 | 20.208.103 | -17,0% |
| Onnur lánsbrøv | 0 | | 0 | 0,0% |
| **Lánsbrøv í alt** | **519.793.251** | **796.404.549** | **270.883.543** | **4,8%** |
| Veðtryggjað útlán | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Aðrar fíggjarognir | 219.528.247 | 28.886.401 | -189.422.393 | -3,3% |
| Avleidd fíggjaramboð | -7.645.113 | 17.267.981 | 46.393.389 | |

**Nota 21 • Býti av partabrøvum á vinnugreinar og økir**

| | Føroyar | Restin av Evropa | Norður-amerika | Suður-amerika | Japan | Restin av Fjareystri | Onnur lond | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 1,0% | 6,5% | 1,6% | 0,0% | 0,0% | 0,9% | 0% | 10,0% |
| Tilfar | 0,0% | 7,2% | 1,9% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 9,1% |
| Ídnaður | 7,7% | 6,0% | 1,5% | 0,0% | 2,3% | 0,0% | 0% | 17,5% |
| Nýtsluvøra | 0,0% | 9,0% | 4,3% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 13,2% |
| Konsumentvøra | 0,0% | 4,6% | 2,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 6,6% |
| Sunnleikarøkt | 0,0% | 3,7% | 3,2% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 7,0% |
| Fíggjing | 1,9% | 5,3% | 8,8% | 2,4% | 0,0% | 1,4% | 0% | 19,8% |
| KT | 0,0% | 2,5% | 9,5% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 11,9% |
| Fjarskifti | 0,0% | 0,0% | 3,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 3,0% |
| Veiting | 0,0% | 0,0% | 1,9% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 1,9% |
| Ikki útgreinað | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0% | 0,0% |
| **Tilsamans** | **10,5%** | **44,8%** | **37,7%** | **2,4%** | **2,3%** | **2,3%** | **0,0%** | **100,0%** |

**Nota 22 • Váðaskema pr. 31. desember 2010**

| (Upphæddir í t.DKK)<br>Hending | Mesta ávirkan á grundar-fæfeingi | Mesta ávirkan á kollektivt bonuspoten-tiali | Mesta ávirkan á bonuspo-tentiali av frí-tryggingum áðr. broyting í nýttum bonuspotentali av frítryggingum | Mesta ávirkan á nýtt bonuspo-bonuspoteniali av frítryggingum |
|---|---|---|---|---|
| Rentuvøkstur á 0,7 prosentstig | -14.046 | -53.571 | 92.217 | 0 |
| Rentufall á 0,7 prosentstig | 43.833 | 226.143 | -88.051 | 0 |
| Partabrævafall á 12 % | -5.298 | -22.584 | 0 | 0 |
| Fall í føstum ognum á 8 % | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Valutaváði (VaR 99,5%) | -847 | -3.609 | 0 | 0 |
| Tap uppá mótpartar 8 % | -2.177 | -9.281 | 0 | 0 |
| Fall í deyðiligheitsintensiteti á 10 % | 0 | -1.416 | -4.979 | 0 |
| Vøkstur í deyðiligheitsintensiteti á 10 % | 0 | 853 | 5.030 | 0 |
| Vøkstur í avlamnisintensiteti á 10 % | 0 | -113 | -2.712 | 0 |

Útrokningarnar eru gjørdar samsvarandi fylgiskjali 15 í Kunngerð nr. 12 frá 1. september 2008 um ársfrásagnir.

Úrokningarnar eru gjørdar við teirri fortreyt, at hendingarnar fara fram her og nú, har ávirkanin er roknað út sum ein beinleiðis ávirkan við støði í javnanum við árslok.

**Nota 23 • Nærstandandi partar**

| | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| **Avgerandi ávirkan:** | |
| Føroya Landsstýri, Tórshavn | Høvuðspartaeigari |
| P/F Føroya Lívstrygging | Høvuðspartaeigari (móðurfelag) |

**Transaktiónir við nærstandandi partar:**
Felagið og móðurfelagið hava felags umsiting, KT og hølir v.m., og kostnaðurin av hesum verður býttur millum feløgini í mun til nýtsluna av hesum. Í árinum eru goldnar 22 mió. kr. til móðurfelagið fyri umsiting v.m.

**Nota 24 • Ognarviðurskifti**
Fylgjandi partaeigarar eru upptiknir í felagsins partaeigarayvirlit við einum ognarparti, ið er omanfyri 5%:

· P/F Føroya Lívstrygging, Tórshavn

**Nota 25 • Nevnd, stjórn og leiðandi starvsfólk**

Nevndar- og stjórnarlimir felagsins eru stjórar og/ella nevndarlimir í fylgjandi føroysku partafeløgum:

| | Leiðslustørv |
|---|---|
| *Nýttar styttingar:* | |
| (NF)= Nevndarformaður | |
| (NL)= Nevndarlimur | |
| (S) = Stjóri | |
| **Nevnd** | |
| Poul Hansen, nevndarformaður | Sp/F Gleipnir (S), P/F Bacalao (S), Sp/F Coldstream (S) |
| | P/F Havsbrún (NF), P/F Føroya Fiskiídnaður (NF), P/F Seglloftið(NL), P/F Faroe Link Maritime (NF), P/F Føroya Lívstrygging (NF) |
| | P/F Fiskamarknaður Føroya (NL), P/F Kimbil (NL) P/F Faroe Cold Stores (NL), P/F Bacalao (NL), Sp/F Hans Joensen (NL) P/F Aluplast (NL), P/F Fastogn (NL), P/F Royndin (NL) |
| Súsanna E. Sørensen, næstformaður | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL) P/F Simprentis (NL), P/F Far-Invest (Rainmaker)(NL) |
| Una J. Joensen | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NF) |
| Jógvan Mørkøre | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL) |
| Gunnleivur Dalsgarð | P/F Føroya Lívstrygging (NL), P/F Royndin (NL) |
| **Stjórn** | |
| Tummas Eliasen | P/F Føroya Lívstrygging,(S), P/F Royndin (S) P/F Virðisbrævamarknaður Føroya (NL), P/F Fastogn (NL) |

**Høvuðstøl (t.DKK)**

| | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 237.907 | 227.511 | - | - | - |
| Útgoldnar veitingar | -96.166 | -61.415 | - | - | - |
| Úrslit av íløguvirksemi | 47.623 | 64.488 | - | - | - |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -23.586 | -18.134 | - | - | - |
| Úrslit av endurtrygging | -2.995 | -2.601 | - | - | - |
| Tryggingartekniskt úrslit | 37.928 | 6.605 | - | - | - |
| Ársúrslit | 29.429 | 3.639 | - | - | - |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 1.035.176 | 902.217 | - | - | - |
| Eginogn tilsamans | 58.068 | 28.639 | - | - | - |
| Aktiv tilsamans | 1.109.534 | 952.882 | - | - | - |
| Depotrenta | 3,5% | 2,5% | - | - | - |

**Lyklatøl**

| | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lykatøl fyri fíggjarvirksemi** | | | | | |
| Avkast áðrenn avdekning | 6,9% | 10,9% | - | - | - |
| Avkast eftir avdekning | 4,8% | 8,4% | - | - | - |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váða** | | | | | |
| Kostnaðir í prosent av tryggingargjøldum | 9,6% | 7,7% | - | - | - |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 3,0% | 1,2% | - | - | - |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 1.592 kr. | 1.098 kr. | - | - | - |
| Kostnaðarúrslit | -5,4% | 0,2% | - | - | - |
| Váðaúrslit | -1,5% | 1,9% | - | - | - |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Bonusstig | 8,1% | 9,3% | - | - | - |
| Kundaognarstig | 7,5% | 6,4% | - | - | - |
| Eigarakapitalstig | 6,9% | 4,0% | - | - | - |
| Yvirdekningsstig | 8,7% | 4,4% | - | - | - |
| Solvensdekningur | 252,4% | 173,0% | - | - | - |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 82,8% | 11,3% | - | - | - |
| Renting av eginogn eftir skatt | 67,9% | 9,3% | - | - | - |
| Renting av kundamiðlum eftir kostnaðir áðrenn skatt | -0,5% | 1,8% | - | - | - |
| Renting av kundaogn áðrenn skatt | 8,7% | 12,0% | - | - | - |

Har tað ikki er møguligt vegna væntandi datagrundarlag at geva upplýsingar, er hetta merkt sum "I/M".